## LIÐUG/UR Á MIÐNÁMSSKÚLA?

Og ert tú fyrikomandi og nærløgd/lagdur, hevur góð samstarvsevni og ert ábyrgdarfull/ur?

**So er hetta kanska nakað fyri teg.**

GrannskoðaraStovan sóknast eftir tveimum næmingum at byrja aftan á summarfrítíðina.

Sum næmingur hjá okkum fært tú frá fyrsta degi praktiskar uppgávur og samband við viðskiftafólk.

Arbeiðið fevnir um so at siga øll øki innan grannskoðan, roknskap, fíggjarliga ráðgeving og skattaviðurskifti.

Umframt at fylgja innanhýsis starvsfólkaútbúgving vænta vit, at tú byrjar at lesa HD. Vit gjalda sjálvandi allar útreiðslur í sambandi við útbúgvingina.

Vilt tú hava meir at vita, kanst tú venda tær til:
Mark T. Højgaard tlf 59 16 01 ella
Eyðbjørg Thorleifsson tlf 59 16 02

Umsóknarfreistin er 15. mai 2011. Umsóknir við avritum av viðkomandi upplýsingum og prógvum, skulu sendast við telduposti til mh@gs.fo ella sum vanligt bræv, til:

**GrannskoðaraStovan Sp/f**
Postboks 190
610 Saltangará

GrannskoðaraStovan Sp/f hevur 8 starvsfólk, herav 4 skrásettar grannskoðarar.

GrannskoðaraStovan Sp/f er partur av ERFA-samtakinum, tí má roknast við samstarvi við starvsfólk atknýtt ERFA, tá talan er um størri uppgávur. 19 starvsfólk, herav 6 skrásettir grannskoðarar, eru atknýtt ERFA samtakinum

WWW.GS.FO GS@GS.FO



## Forrkela teg og tíni !!

Hvat við Gimbrastovu við Ljósá ?

Nýggjar myndir eru á heimasíðuni

www.ognir.fo

lp@ognir.fo
Tlf. 217300

## Eldri hús til leigu
**í M. Heinasonar gøtu**

Miðhædd: Durur, køkur, stova, kamar, wc.
Loft: 2 kømur.
Wc+brúsa í kjallara.
**Tlf. 266780,**
eftir kl. 16:00

# TIL SØLU

## Vælverustovan Monroe og Frisørstovan Monroe

**eru nú til sølu, saman ella hvør sær**

Vælverustovan Monroe liggur í handilsøkinum við Streymin, við Norðskála. Hildið verður til í leigaðum hølum, sum eru innrættaði júst til endamálið. Hølini eru sera snøgg, við nútímans hentleikum til vælverustovu og frisørsalong. Frisørsalongin er stór og rúmlig við 7 frisørstólum, tveimum vaskum og tveimum make-up plássum. Vælverustovan hevur tvey viðgerðarrúm til kostmetolog/massagu/spa o.s.fr., eitt gosbað og eina hugnaliga gongd við bíðirúmi.

Frisørstovan Monroe liggur á Heygavegi 19 í Klaksvík. Hildið verður til í leigaðum hølum, sum eru bygd til endamálið. Frisørsalongin er ný ístandgjørd, er sera snøgg við nútímans hentleikum. Frisørsalongin er rúmlig við 6 frisørstólum, tveimum vaskum, tveimum make-up plássum og einum viðgerðarrúmi til kostmetolog/massagu o.s.fr..

Monroe hevur fasta avtalu um vistfrøðilig produktir, og eru annars góðir møguleikar at vaksa um virksemið.

Um tú ert áhugað í at keypa báðar ella aðra salongina, ella at hoyra meira um Monroe, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Mimi Steintórsdóttir, advokat á tlf. 506030 og t-post ms@lawfirm.fo

Sí annars myndir av Vælveru- og Frisørstovuni Monroe á heimasíðuni www.monroe.fo ella www.lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# GERST MEDIATOR

## Intensivt skeið í mediatión – konfliktmekling

Mediatión er skipað samtala, sum gevur ósamdum pørtum møguleika til undir leiðslu av útbúnum meklara/mediator at tosa seg til sættis. Samtala kann vera trupul, tá ósemjur eru og nógvar kenslur. Misálit og mistulkingar og óheppið tosingarlag skaðar samskiftið, og trætan fastlæsist so, at ilt kann vera at koma sær burturúr aftur uttan hjálp uttanífrá.

Mediator virkar sum tann uttanveltaði triðjipersónurin, sum skipar samtaluna so, at ósamdu partarnir lættari gerast førir fyri sjálvir at loysa ósemjuna og at hyggja frameftir.

Mediatión er ein samráðingarháttur, sum hevur sum fortreyt at fólk vilja tosa saman.

**11. og 13. mai 2011: kl. 13.00 – 16.00**
Teorisk kunning um konfliktfaran, konfliktmynstur og konflikthandfaringarhættir.
Um atburð, tosingarlag og mediatión.

**25. og 27. mai 2011: kl. 13.00 – 16.00**
Fortreytir fyri dialogi, video og rolluspæl.

**30., 31. mai og 1. juni 2011:**
**kl. 18.00 – 21.00**
Rolluspæl, teori, fortreytir fyri mediator og etikkur.

**Avmarkað luttøka:**
Til tess at luttakararnir skulu fáa høvi veruliga at royna seg sum meklarar, er luttøkan avmarkað til 10 persónar.

**Kostnaðurin:**
Íalt pr. persón kr. 10.800 + mvg. ella íalt kr. 13.500. Matur á middegi og kaffi eru íroknað teir 3 dagarnar, rolluspølini eru. Aftrat kemur kostnaður fyri keyp av 2 bókum, uml. kr. 500,-. Annað tilfar er íroknað skeiðsgjaldinum.

**Tilmelding:** hjá Turið Debes Hentze, tdh@hentze.fo

**Málbólkur:**
Einhvør, sum hevur tørv á betri kunnleika at handfara konfliktstøður, og sum hevur ábyrgdina av at handfara tvístøður millum fólk á skilagóðan hátt.

Umframt at fáa førleikan at virka beinleiðis sum mediator, fæst grundleggjandi innlit í, hvussu ein við egnum atburði og málburði ávirkar eina tvístøðu. Undirvísingin mennir eisini eins egnu evnir at samráðast konstruktiv.

**Dømi um málbólkar:**
Fólk í leiðslustørvum

Meiri kann lesast um skeiðið og mediatión á www.hentze.fo

Advokatskrivstovan Hentze

**Tróndargøta 19**
**100 Tórshavn**
**tel. 311460 – fax 311490**
**hentze@hentze.fo – www.hentze.fo**



## AÐALFUNDUR
Stuðlafelagið ÍSB hevur aðalfund í B36-húsinum týsdagin 3 mai kl.18.
**Nevndin**

## DUNNUEGG
Dunnuegg til sølu,
4 kr stk.
**269663**

## AÐALFUNDUR
Ársaðalfundur verður í Bygdarhúsinum 27. apríl kl. 20. Dagsskrá sambært lógum felagsins.
**Bygdarhúsfelagið Leirvík**

## LFB AÐALFUNDUR
verður 30. apríl kl 13.30 í Fuglafirði Skrá sambært lógina.
**Landsfelagið fyri Bjargingarfeløgini**

## AÐALFUNDUR
Aðalfundur verður í ÍSF-húsinum fríggjadagin 29. apríl kl. 18.00. Skrá sambært viðtøkunum.
**Nevndin BSKF**



## Sethús í Fámjin til sølu

Húsini, matr. nr. 24b eru uml. 70m² við kjallara, grundøkið er 230m².

Húsini eru bygd uml. 1930; tey krevja ábøtur.

**Húsini verða seld hægstbjóðandi yvir 225.000,- krónur.**

Áhugað kunnu ringja 216 595.

**Fámjins kommuna**